FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. september 2022
J. nr.: 22/16783
Viðgjørt: AE/BAB

Svar til fyrispurning nr. 52-028/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um príshækkingar hjá Bygdaleiðum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv fara prísirnir hjá Bygdaleiðum at hækka fyri mánaðarkort og vanligan ferðaseðil?
2. Nær fara prísirnir at hækka?
3. Metir landsstýrismaðurin, at hetta er rætta løtan at hækka prísirnar, samstundis sum vit síggja ógvusligar príshækkingar á øðrum økjum?
4. Kunnu viðskiftafólkini vænta, at tænastan verður betri við hægri prísum, t.d. at fleiri túrar verða úr Klaksvík og gjøgnum Eysturoyartunnilin til Havnar?

Svar til 1, 2 og 3
Tænastustøðið hjá Bygdaleiðum má metast at verða gott, og er bíligt at ferðast. Meginparturin av beinleiðis rakstrinum av Bygdaleiðum, umleið 75%, verður fíggjaður av landskassanum.

Í sambandi við eina dagføring av KT skipanini hækkaðu einstakir prísir av misgáum á einstøkum leiðum. Mistakið varð rættað eftir 36 tímar.

Svar til 3
Sæð í mun til, at prísir á olju og øðrum vørum eru hækkaðir, er skilagott at dagføra prísirnar. Landsstýrismaðurin fer saman við Strandferðsluni, at viðgera hetta komandi tíðina.

Svar til 4
Tað mugu roknast við broytingum á leiðunum millum norðurøkið og Suðurstreymoy, umvegis Eysturoyartunnilin. Ein partur av hesum broytingum verður, at fáa fleiri snartúrar millum nevndu økir, samstundis sum tillagingar verða gjørdar á øðrum leiðum innanfyri galdandi sáttmálar. Eisini verður arbeitt við, at fáa betra sambandið millum norð-, suður-, og vesturøkið, umvegis Eysturoyartunnilin, í sambandi við, at Sandoyartunnilin letur upp í 2023.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Nýtsla av Eysturoyartunnilinum er ein eyka útreiðsla fyri Strandferðsluna. Møguliga verður neyðugt at tillaga prísirnar, fyri at fáa fíggjarætlanina fyri Bygdaleiðir at hanga saman við øktu útreiðslunum.

Tinganes, 29. september 2022

Uni Rasmussen
landsstýrismaður í fíggjarmálum